# Marstin & the Revelators

**Limirnir í bólkinum, Marstin & the Revelators dáma sera væl at klippa negl, sápubløðrur, kjakast um hvussu eitt jarðber skal etast, svimja í køldum havi og Gud. Teir eru millum 19 og 23, og dáma væl at fortelja søgur**

FJARÐAFESTIVALUR 08
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



**Hóast bíblian skal takast í ramasta álvara, er ætlanin at halda eina glaða og karismatiska framførslu, sigur Martin í Grund, oddamaður í bólkinum**

Marstin & the Revelators, hevur gøtumannin Martin í Grund til oddamann. Orsøkin til, at Martin verður stavsettur Marstin, er fyri at fáa tey enskt talandi at úttala navnið rætt. Bólkurin varð stovnaður fyri umleið einum árið síðani á einum tónleikaskúla í Coventry í Onglandi, og tað er orsøkin til, at tveir onglendingar eru við í bólkinum. Hinir limirnir í bólkinum eru Pauli Poulsen, Matt Harris og Samuel King, ið leika á ávikavist guitar, bass og trummur. Harumframt hava teir til framførsluna á Fjarðafestivalinum, fingið Jákup Justinussen, sum føroyingarnir í bólkinum hava kent leingi, at leika á tangentar.

## Oddamaðurin

Martin Mohr í Grund er 23 ára gamal. Hann skrivaði sín fyrsta sang sum níggju ára gamal, og sær seg sjálvan fyrst og fremst sum sangskrivara.

- At skriva tekstir og løg eru tey evnini, mær eru givin. At eg spæli guitar í bólkinum er bara av tilvild, tí tað er ljóðføri eg dugi best at spæla.

Hann skrivar bæði løg og tekstir hjá bólkinum, sum hann síðani tekur við í venjingarhølið, har hinir í bólkinum hjálpa til at gera nakrar smávegis broytingar.

## Fortelja søgur

- Ætlan okkara er at fortelja søgur og at seta fleiri spurningar, enn vit koma við svarum til. Íblásturin kemur í flestu førum úr gamla testamenti, har nógvar áhugaverdar og sigandi søgur eru. Harumframt eru nógvir tekstir um blomstur og fuglar, sum eisini eru ein áhugaverdur partur av lívinum. Hóast bíblian skal takast í ramasta álvara, er ætlanin at halda eina glaða og karismatiska framførslu.

## Ungir kristnir menn

Bókurin heldur seg ikki vera ein kristnan bólk, tí teir vita ikki hvat eyðkennir ein tílíkan, men teir eru allir kristnir og eru við í samkomum.

Um málini hjá bólkinum, sigur Martin í Grund, stutt og greitt.

- Vit vilja gera so nógv gott sum møguligt á so nógvum støðum sum møguligt.

Oddamaðurin í bólkinum greiðir eisini frá, at tónleikaliga spenna teir frá punk til country, og vanligasta viðmerkingin teir fáa, er at teir eru øðrvísi enn aðrir bólkar.

## Broytingar í væntu

Á framførsluni á Fjarðafestivalinum, verða sum nevnt tríggir føroyingar á pallinum, men tá oddamaðurin, um stutta tíð fer niður aftur til Onglands á tónleikaskúlan, verður hann einsamallur føroyingur í bólkinum.

Á Fjarðafestivalinum gleða Marstin & the Revelators seg serliga til Sarah Kelly, sum teir kenna frá eini konsert í Íslandi.

# Woody Wright

**Singer / Songwriter Woody Wright syngur sínar sangir við sannføring og megi, og á konsertunum hjá sær framførir hann ofta sangir, sum hann hevur skrivað til fleiri country- og gospelsangarar, millum annað Charley Pride, Jessy Dixon og Russ Taff. Í vikuskiftinum framførir Woddy Wright á Fjarðafestivalinum**

FJARÐAFESTIVALUR 08
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Live-framførslurnar hjá Woody Wright rúma øllum lutunum, sum ein fullførd gospelkonsert eigur at rúma. Tey upptíttaðu løgini mana fram lógvabrestir og fótatrampan. Mátin hann handferð klassiskar sangir, sálmar og upprunalig tónlistaverk fáa fram sjálva andan, sum hugtók lurtarar í øllum aldursbólkum, og hansara komisku tulkingar av gerandislívinum fáa sjálvt tann harðasta kynikaran at flenna.

Søgan hjá Woody Wright sum sangari og sangskrivari byrjar í 1973. Tá luttók hann, saman við Elaine Baker og Gina Gill, í einari lokalari sangtalentkapping, sum WECO Radio í Wartburg í Tennessee skipaði fyri. Tey høvdu sungið saman í nøkur ár í ungdómskórinum hjá babtiskakirkjuni í Cedar Grove í Kingston, og saman vunnu tey hesa kappingina. Tey næstu trý árini spældu og sungu tey, har tey kundu sleppa framat, til tey í 1976 fóru hvør til sítt.

## Royndur maður í tónleiki

Eftir at Woody Wright varð farin úr High School og breyt við Elaine Baker og Gina Gill, fór hann uppí »The Scenicland Boys«, sum hann spældi saman við til 1979, tá hann fór víðari til »The Tennesseans«. Har gjørdist hann fjórði maður í einari kvartett og flutti til Nashville.

Haðan gekk leiðin víðari í 1982, tá hann saman við David Ponder og Michael Sykes stovnaði bólkin »Ponder, Sykes & Wright«. Í 1992 bleiv tað til bólkin »Matthews, Wright & King«, sum skuldi verða ein nýggj country-mannfólkatrio úr Nashville, sum hann millum annað spældi saman við á Center Stage við World Trade Center í 1993.

Í 1997 gjørdist hann bakgrundssangari í sendingini Prime Time Country, har hann var bakgrundssangari hjá langt yvir 100 kendum og minni kendum sangarum.



**Woody Wright hevur síðan 2001 spælt m.a. í Jerusalem og Johannesburg. Nú kemur hann til Føroya**

Frá 1997 til ár 2000 var han naftur saman við Ponder og Sykes, og saman góvu teir út plátuna Spring Hill, sum varð nominerað til »Country Album of the Year« við Dove Awards í ’98.

Eftir heystið í 2001 hevur hann framført í fleiri heimspørtum, frá Atalanta í USA til heilaga býin Jerusalem til Johannesburg í Suður Afrika. Og nú heldur hann leiðina fram í Evropa og víðari til Føroya, har vit hava møguleikan at roynda tónleikaran og sangskrivaran á Fjarðafestivalinum, sum verður um vikuskiftið.